Løgtingslóg

um

føroyskt sum annaðmál

Virkisøki

§ 1. Eftir reglunum í hesi løgtingslóg verður undirvísing og útbúgving í føroyskum sum annaðmál boðin øllum útlendingum, sum hava fingið uppihaldsloyvi í Føroyum og sum eru yvir undirvísingarskyldugan aldur sambært løgtingslóg um fólkaskúlan.

§ 2. Skipast kann fyri undirvísing í móðurmáli og fyri annaðmálsundirvísing í øðrum máli enn føroyskum fyri næmingar, sum eru fevndir av hesi løgtingslóg, og sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál.

Skipan av tilboðnum

§ 3. Undirvísingarstýrið skipar undirvísingina saman við samstarvsskúlum. Samstarvsskúlin kann vera ein av landsstýrisfólkinum góðkendur miðnámsskúli ella annar góðkendur skúli.
Stk. 2. Bústaðarkommunan skal vísa tilflytarum til nærmasta undirvísingarstað sambært stk. 1.

§ 4. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um:
1) Innihaldið í undirvísingini.
2) Innihaldið í útbúgvingini.
3) Førleikakrøv til lærarar, sum undirvísa sambært hesi løgtingslóg.

§ 5. Undirvísing sambært hesi løgtingslóg kann eisini skipast sum umbiðin skeið.
Stk. 2. Undirvísingarstýrið skal góðkenna umbiðin skeið.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um skeið sambært stk. 1, harundir reglur um luttøkugjald.

Upptøka

§ 6. Undirvísingarstýrið ger saman við samstarvsskúlunum leiðreglur viðvíkjandi upptøku av næmingum, virksemi, undirvísingartilboðum o.ø.

§ 7. Undirvísingarstýrið skipar í samstarvi við samstarvsskúlarnar fyri kunning, innskriving, visitatión og undirvísing sambært hesi løgtingslóg.

Námsætlan og prógtøka

§ 8. Undirvísing sambært hesi løgtingslóg skal fylgja námsætlan, sum landsstýrisfólkið letur gera.

§ 9. Undirvísing eftir hesi løgtingslóg kann enda við roynd ella prógtøku.

§ 10. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um royndir og prógtøkur sambært hesi løgtingslóg.

Ábyrgd hjá samstarvsskúlum og setan av lærarum

§ 11. Samstarvsskúlin hevur námsfrøðiligu, fakligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av undirvísingini.
Stk. 2. Samstarvsskúlin setur, í samráð við Undirvísingarstýrið, lærarar í starv at undirvísa sambært hesi løgtingslóg. Hvør skúli er eitt setanarøki, men samstarvsskúlarnir kunnu í samráð við

Undirvísingarstýrið gera avtalu um samstarv viðvíkjandi lærarum.

Fígging

§ 12. Landið ber kostnaðin av undirvísing og útbúgving sambært hesi løgtingslóg, undantikið tó tey í § 5 nevndu skeið.

Ráðgevandi nevnd

§ 13. Landsstýrisfólkið setur ráðgevandi nevnd at hjálpa til við samskipan av undirvísing sambært §§ 1 og 2.
Stk. 2. Í nevndini sita eitt umboð fyri hvønn samstarvsskúla, Fróðskaparsetur Føroya, Útlendingastovuna, Nám og Undirvísingarstýrið.
Stk. 3. Umboðið fyri Undirvísingarstýrið er forfólk í nevndini.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur fyri virki nevndarinnar.

Kærur

§ 14. Fyrisitingarligar og námsfrøðiligar avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu innan 7 dagar frá tí, avgerðin er tikin, skrivliga kærast til landsstýrisfólkið.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um kærur, harundir í hvønn mun og undir hvørjum treytum samstarvsskúlin kann bjóða næmingi endurroynd ella umdøming.

Gildiskoma

§ 15. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Endurskoðan

§ 16. Landsstýrisfólkið skal eftir trimum árum frá gildiskomu leggja fram fyri Løgtingið frágreiðing um, hvussu løgtingslógin hevur roynst, og um hon hevur virkað eftir ætlan.

Samtykt á Løgtingi hin 13. mai 2024 við 27-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 14. mai 2024

stjóri